NORÐOYA SPARIKASSI

# Roknskapur 1. hálvár 2004

## RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2004

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur o.a. | 34.231 | 35.806 |
| 2 | Rentuútreiðslur o.a. | 7.295 | 8.851 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **26.936** | **26.955** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 39 | 44 |
| | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.808 | 1.459 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 136 | 58 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **28.647** | **28.400** |
| 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -310 | 3 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 214 | 217 |
| 4 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 14.738 | 14.931 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 475 | 463 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | 55 | 323 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 2.212 | 248 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **11.071** | **12.655** |
| | Skattur | 2.214 | 2.529 |
| | **Hálvársúrslit** | **8.857** | **10.126** |

## FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI 2004

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankanum | 30.860 | 10.732 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 44.379 | 58.967 |
| | Útlán | 898.724 | 839.776 |
| | Lánsbrøv | 174.738 | 213.253 |
| | Partabrøv o.a. | 724 | 729 |
| | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 15.596 | 14.650 |
| | Ítøkiligar ognir | 10.601 | 8.763 |
| | Aðrar ognir | 2.800 | 3.731 |
| | **Ogn tilsamans** | **1.178.422** | **1.150.601** |
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | Skuld til peningastovnar | 0 | 0 |
| | Innlán | 914.343 | 900.648 |
| | Onnur skuld | 9.871 | 11.900 |
| | Burturleggingar til útreiðslur | 2.931 | 3.023 |
| | **Skuld tilsamans** | **927.145** | **915.571** |
| | Eginpeningur | 242.420 | 224.904 |
| | Hálvársúrslit eftir skatt | 8.857 | 10.126 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **251.277** | **235.030** |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.178.422** | **1.150.601** |
| | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| 5 | Ábyrgdir og aðrar ábyrgdir | 79.862 | 81.076 |

## VIÐMERKINGAR

| Viðm. | | 2004<br>1.000 DKK | 2003<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Renta av innistandandi í peningastovnum | 750 | 1.024 |
| | Renta av útlánum | 29.975 | 29.376 |
| | Renta av lánsbrøvum | 3.506 | 5.406 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **34.231** | **35.806** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Renta til peningastovnar | 0 | 0 |
| | Renta til innlán | 7.241 | 8.796 |
| | Renta til ábyrgdarapening | 54 | 55 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **7.295** | **8.851** |
| 3 | **Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra** | | |
| | Virðisjavnan av lánsbrøvum | -310 | 34 |
| | Virðisjavnan av partabrøvum | 0 | 0 |
| | Virðisjavnan av gjaldoyra | 0 | -31 |
| | **Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra tilsamans** | **-310** | **3** |
| 4 | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting** | | |
| | Lønir og samsýning til umsjónarráð og stjórn | 790 | 695 |
| | Starvsfólkalønir | 4.868 | 4.668 |
| | Eftirløn til starvsfólk og løn til eftirlønt starvsfólk | 917 | 810 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 427 | 369 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk tilsamans** | **7.002** | **6.542** |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 7.736 | 8.389 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting tilsamans** | **14.738** | **14.931** |
| 5 | **Ábyrgdir og aðrar skyldur** | | |
| | Aðrar ábyrgdir | 75.737 | 77.421 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 4.125 | 3.655 |
| | | **79.862** | **81.076** |

## LYKLATØL 1. HÁLVÁR

| Lyklatøl | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 28,3 | 27,2 | 30,1 | 31,8 | 31,1 |
| Kjarnukapitalprosent | 28,3 | 27,2 | 30,1 | 31,8 | 31,1 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 4,5 | 5,5 | 5,9 | 6,0 | 2,3 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 3,6 | 4,4 | 4,7 | 4,8 | 1,9 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,63 | 1,79 | 1,77 | 1,71 | 1,24 |
| Rentuváði | 1,3 | 2,7 | 2,5 | 3,0 | 4,3 |
| Gjaldoyrastøða | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 101,9 | 96,2 | 92,0 | 82,7 | 92,4 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 148,5 | 185,0 | 248,0 | 304,0 | 196,0 |
| Stórir kundar tilsamans | 37,9 | 51,2 | 27,5 | 21,5 | 28,6 |
| Burturleggingarprosent | 3,4 | 2,9 | 3,9 | 4,1 | 4,2 |
| Hálvárstaps- og burturleggingarprosent | 0,2 | 0,0 | 0,3 | 0,5 | 0,4 |
| Hálvársútlánsvøkstur | 1,1 | 5,8 | 5,6 | 0,3 | 1,1 |
| Útlán í mun til eginpening | 3,6 | 3,6 | 3,5 | 3,3 | 3,7 |

## ROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2004 HJÁ NORÐOYA SPARIKASSA

Norðoya Sparikassi hevði eitt úrslit áðrenn skatt fyrra hálvár 2004 uppá 11,1 mió.kr. Hetta er ein minking uppá 1,6 mió.kr. í mun til fyrra hálvár 2003, tá úrslitið var 12,7 mió.kr. Sparikassin er nøgdur við hetta úrslit, tá havt verður í huga at minkingin í høvuðsheitinum stavar frá øktum burturleggingum uppá skuldarar.

### Inntøkur

Netto rentuinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 26,9 mió.kr. og er hetta á leið tað sama sum sama tíðarskeið í 2003.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 28,6 mió.kr. móti 28,4 mió.kr. sama tíðarskeið í 2003. Hetta er ein lítil vøkstur uppá 0,2 mió.kr. svarandi til 0,9%.

Lága rentustøði hevur havt við sær at sparikassin aftur í ár hevur javnað rentu- og kostnaðarstøðið, sum aftur hevur við sær at vøksturin í netto rentu- og kostnaðar-inntøkunum ikki er eins stórur sum vøksturin í fíggjarstøðuni.

### Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk og umsiting vóru 14,7 mió.kr. móti 14,9 mió.kr. fyrra hálvár í fjør. Hetta er ein minking uppá 0,2 mió.kr. ella 1,3 %. Sparikassin væntar tó, at útreiðslurnar, tá árið er lokið, verða á leið tað sama sum alt árið 2003.

### Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar

Avskrivingar og burturleggingar móti tapi av útlánum og ábyrgdum vóru 2,2 mió.kr. móti 0,2 mió.kr. í 2003.

### Fíggjarstøða

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar nú við 1.178 mió.kr. móti 1.151 mió.kr. seinasta ár. Hetta er ein vøkstur uppá 2,4%. Innlánið er nú 914 mió.kr., sum svarar til ein vøkstur uppá 1,5%, meðan útlánið er 899 mió.kr., svarandi til ein vøkstur uppá 7%.

Eginpeningur sparikassans er nú góðar 251 mió.kr., og er farna árið øktur við 16,2 mió.kr., ið er ein vøkstur uppá smá 7%. Eginognin er nú 21,3% av samlaðu fíggjarstøðuni móti 20,4% í 2003.

### Gjaldføri og solvensur

Gjaldføri sparikassans er framvegis gott, og er nú 250 mió.kr. móti 283 mió.kr. í 2003. Broytingin stavar frá, at útlánið hetta seinasta árið er vaksið heldur skjótari enn innlánið. Solvensur sparikassans er øktur við 1,1%, úr 27,2% í 2003 til 28,3% fyrra hálvár 2004.

### Útlit seinra hálvár

Havandi í huga, at steðgur tykist verða komin í búskaparliga vøksturin í samfelagnum, er sparikassin nøgdur við úrslitið fyrra hálvár, og væntar at úrslitið seinra hálvár verður áleið tað sama.